# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar



*8. januar fingu Rabah og Ruth Fjallsá Benbakoura, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3425 gr.*



*Tann 24. januar fingu Rita Sakalia, Tokelau NZ og Andreas Andreasen, Tórshavn, eina dóttur. Hon vigaði 3576 gr. Diddan eitur Madison Marie Summer Sakalia-Andreasen.*



*Mikudagin 2.februar fingu Dina Haahr og Búi Heinesen, búsitandi í Odense, eina dóttur. Hon vigaði 3704 gr og var 52 cm long.*

14. januar fingu Gitte Søe og Magni Reinert Petersen, Fredericia, tvíburðar, gentur, sum eita Julie og Sofie. Julie var 45 cm long og vigaði 1670 gr. Sofie var 45 cm long og vigaði 1700 gr.

18. januar fingu Finnbjørg Jacobsen og Lennart Mølgaard, Madrid, eina dóttur. Hon var 47 cm long og vigaði 3300 gr.

10. februar fingu Bára og Janus Joensen, Norðragøtu, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3650 gr.

11. februar fingu Rakul í Gerðinum og Marni Olsen, Trongisvági, eina dóttur. Hon var 49 cm long og vigaði 2650 gr.

11. februar fingu Marina Haraldsen og Tony Olsen, Miðvági, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3760 gr.

11. februar fingu Turid Jacobsen og Birgir Vatnhamar Olsen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3325 gr.

12. februar fingu Ingibjørg D. Abrahamsen og Niels Winther, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 57 cm long og vigaði 4400 gr.

15. februar fingu Magna Dania og Sørin Ragnar Joensen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3350 gr.



# Nicolina og Torleif Justinussen gullbrúdleyp

Í dag, leygardagin 19. februar, hava Nicolina og Torleif Justinussen í Klaksvík verið saman í hjúnabandi í hálvt hundrað ár. Gullbrúdleypið hátíðarhalda tey í kjallaranum í Christianskirkjuni, har tað frá klokkan fýra seinnapartin verður opið hús.

Nicolina hevur búð í Klaksvík síðani hon var níggju ára gomul, men hon er ættað sunnan úr Vági. Foreldrini vóru Ella, sum var ættað av Eiði, og Niclas Lassen úr Toftum í Vági. Nicolina varð fødd 16. februar í 1932. Hon minnist einki til pápa sín, sum hevði nýføðingin á knøunum, áðrenn hann hetta várið fór til skips við Lauru. Eingin teirra spurdist aftur.

Ella giftist uppaftur nýggjársaftan í 1941 við Zacharis Nielsen, sum var ættaður úr Vatnsoyrum, og sum búði á Kósini. Hann var einkjumaður og átti tveir synir - Martin og Eilif. Ella og Zacharis fingu fýra børn - Sigvør, Randi, Karl og Richard, so har vuksu upp í systkinaflokki sjey, sum vóru míni børn, tíni børn og okkara børn.

Torleif, sum er føddur 24. februar í 1932, er ættaður úr Árnafirði. Foreldrini hjá honum vóru Gertrud og Ísak Justinussen. Hon var av Stongunum í Klaksvík, og hann var úr Árnafirði. Tey fingu fýra børn, sum øll búgva í Klaksvík - Anna, Mása, Torleif og Ingrid.

Eftir at Nicolina og Torleif vóru gift í 1955, búsettust tey í Árnafirði, har tey búðu í 16 ár. Nicolina hevur altíð verið heimaarbeiðandi. Hon hevur tikið sær av manni og børnum, og tað hevur eyðkent hana, at hon hevur havt umsorgan fyri sínum og so mongum øðrum. Eitt nú hevur hon verið røsk at skriva brøv. Av og á hava minningarorð og aðrar heilsanir frá hennara hond verið at sæð í bløðunum, og onkra yrkingina hevur hon eisini sett saman.

Ísakur, pápi Torleif, sigldi við Dáva úr Gerðum. Hann var við, tá ið Ernstina fórst í 1930, og seinni sigldi hann við Skálanesi. Torleif var eisini til skips við Skálanesi, og so var hann eisini við Levi hjá Dáva, tá ið hann førdi línubátin Stellu Mariu.

Í fleiri ár róði Torleif út í Árnafirði. Í 1971 fór hann at arbeiða á flakavirkinum á Kósini, og tá var tað skjótt, at familjan flutti til Klaksvíkar. Torleif var á Kósini, inntil hann fyri fáum árum síðani varð pensioneraður. Fyri stuttum fluttu Nicolina og Torleif úr raðhúsunum á Stongunum og í nýggja íbúð norðuri í Kráarbrekku at búgva.

Nicolina og Torleif fingu fimm børn - Niclas, Tomm, Gertrud, Elmar og Óli. Niclas, Tomm og Elmar búgva í Klaksvík, og Gertrud býr í Árnafirði. Tað var stórur smeitur fyri Nicolinu og Torleif og familjuna, tá ið tey í 2000 mistu Óla, sum so ofta var saman við pápanum, eitt nú á floti á Árnafirði.

Hóast tað nú eru mong ár síðani, at familjan flutti úr Árnafirði, so er alskurin til og vitjanirnar í heimstaðnum nógvar. Tá ið 8-mannafarið Árnfirðingurin var upp á tað besta miðskeiðis í seksti árunum var Torleif við til at manna bátin.

Sunnudagar verður ofta leita til Árnafjarðar í kirkju, og so ganga tey eisini nógv í Emmaus í Klaksvík.

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo